# Steypavinnarar vunnu grannauppgerð

**Steypavinnarararnir úr Runavík vóru og vitjaðu í Gøtu sunnudagin. GÍ lá á øðrum plássi, og tí var lagt upp til ein spennandi dyst, har GÍ skuldi royna og halda fast um góðu plaseringina á stigatalvuni**

1.DEILD MENN
*Bjartur Nolsøe*




*Danin, Ulrik Balling, var aftur á plettinum fyri NSÍ sunnudagin, og runavíkingar eru nú av álvara farnir at gera um seg aftur í oddastríðnum*

Heldur óvæntað fekk NSÍ í síðstu løtu Ulrik Balling við til dystin móti GÍ. Hann byrjaði inni í staðin fyri Óla Hansen í álopinum.

Ongin ivi er í, at Ulrik Balling hevur sínar dygdir. Á Ólavsøku átti hann stóran leiklut í sigrinum um løgmanssteypið. Móti GÍ átti hann ikki minni leiklut í 2-0 sigrinum. Við sínum skjótleika og beinleiðis spælið, var hann ferð eftir ferð ein hóttan móti verjuni hjá gøtumonnum. Og tað vistu gøtumenn eisini, og tí høvdu teir altíð 2-3 tríggjar mans, sum meira ella minni ansaðu honum, og tað gav sjálvandi pláss til hinar runavíkingarnar.

Hetta pláss gjørdu teir tó ikki brúk av í byrjanini av dystinum. Tí tað var GÍ sum legði betri fyri. Gøtumenn høvdu bóltin meir, men stinna verjan hjá NSÍ helt teimum vekk frá teimum stóru møguleikum.

Tá okkurt um eitt korter var farið høvdu gøtumenn fyrstu veruligu royndina á mál, tá Súni Olsen royndi seg við einum góðum skoti úti frá.

## NSÍ vandamiklari

So hvørt sum fyrri hálvleikur leið kom NSÍ meira við í dystin. Teir blivu meira sinnaðir at fara fleiri framvið, tá mótálop spurdust burturúr. Og einar tríggjar ferðir vóru teir heilt nær við at fáa fyrsta málið.

Bæði Sonni L. Petersen og Bergur Djurhuus brendu góðar møguleikar, og Ulrik Balling hevði eitt gott skot mitt á Hallur Hansen í GÍ-málinum.

Eftir hetta var tað sum at GÍ kom meiri við aftur, og Bartal Eliasen hevði eina góða roynd við høvdinum eftir hornaspark, men NSÍ-verjan stóð fyri tá bólturin hevði kós móti málinum.Løtu seinni hevði Súni Olsen ein heilfluktara sum fór beint við síðuna av, eftir at gøtumenn tóku eitt skjótt fríspark.

Tá tað manglaðu okkurt um tríggir minuttir av fyrra hálvleiki, kom so fyrsta málið í dystinum. Jens Martin Knudsen tveitir bóltin út til Sjúrð Jacobsen í vinstru síðu. Sjúrður fór framvið tveimum gøtumonnum, áðrenn hann við eini neyvari avlevering fann Ulrik Balling, sum setti høvdið á so bólturin fór í mál.

NSÍ fekk veruliga blóð uppá tonnina av hesum málinum, og beint aftaná kundi sami Balling gjørt tað til 2-0, tá Helgi L. Petersen sendi bóltin innfyri úr høgru síðu.

Hálvleikstøðan var 1-0 til NSÍ, og hóast gøtumenn kanska høvdu havt bóltin meira og fluttu hann væl runt, so vóru runavíkingar vandamiklari, serliga í mongu mótálopunum sum spurdist burturúr.

## GÍ meiri spæl

Hevði GÍ havt bóltin meir í fyrra hálvleiki, so bleiv tann yvirvágin enn greiðari í seinna hálvleiki. Krzystof Popczynski kom inn í álopið, og Súni Olsen bleiv fluttur longur aftur á vøllin. GÍ hevði nógv spæl fram móti NSÍ-brotsteiginum, men so vóru álopini avbrotin av verjuni hjá NSÍ.

Men heilt snikkaleysir sluppu runavíkingar ikki. Magni Jarnskor fekk ein bólt uttarlaga í NSÍ-brotsteiginum, spældi hann tvørturum til Krzystof, men hann rakti ikki bóltin, og í staðin kom Súni Fríði Johannesen at standa rangstaddur. Her burdu gøtumenn javnað.

Eftir hetta var langt millum málmøguleikarnar. Runavíkingar tóktist hava tamarhald á støðuni, og GÍ royndi í sínum lagi at flyta bóltin skjótt, men sjáldan kom nøkur vandamikil støða burturúr.

## Reytt kort

Men bæði liðini vóru ágrýtin, og fóru í nærdystirnar við fullum alvi. Og onkuntíð vóru taklingarnar í so harðar, og tí vóru fleiri gul kort á lofti í seinna hálvleiki.

Tá hálvur timi var farin av seinna hálvleiki, fekk GÍ ein góðan møguleika, tá Súni Fríði spældi inn til Súna Olsen sum skeyt beint við síðuna av.

Sum dysturin fór at halla, kastaði GÍ alt fólkið fram. Hetta gav NSÍ enn meira pláss til mótálop, og tað var júst eitt slíkt ið avgjørdi dystin tá bert fýra minuttir vóru eftir. Kári Hansen fór einsamallur í gjøgnum GÍ-verjuna, og komin inn móti málmanninum fekk hann akkurát skotið bóltin framvið og inn í málið. Nú var ongin vegur aftur hjá GÍ.

Í síðsta minutti bleiv rættuligt rok millum leikarar á báðum liðunum, og tað endaði við, at málskjúttin til 2-0 Kári Hansen varð rikin av vølli.

Samanumtikið ein undirhaldandi dystur, har GÍ hevði bóltin mest, men NSÍ hevði vandamiklaru málmøguleikarnar. Úrslitið merkir, at NSÍ fór framum GÍ á øðrum plássi. Men javnt er í oddinum, og enn eru nógv lið um boðið til at gerast meistarar.

**Dysturin í tølum:**
GÍ-NSÍ 0-2(0-1)
0-1: Ulrik Balling
0-2: Kári Hansen

# Gert verður ikki við aftur í ár

**Ulrik Balling og NSÍ skrivaðu sunnudagin undir sáttmála, sum ber við sær, at danin verður á NSÍ liðnum tað, sum er eftir av kappingini**

NSÍ LIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Gert Langgaard verður ikki á liðnum, nú NSÍ av álvara fer at stríðast fyri at vinna fyrsta meistaraskapin nakrantíð. Hetta gjørdist greitt sunnukvøldið.

Gert Langgaard, sum í 2. hálvleiki varð innskiftur, varð skaddur í dystinum í Gøtu sunnudagin. Tá vit frættu, var ikki staðfest, hvussu álvarsligur skaðin var. Men sambært NSÍ venjaran, Jógvan Martin Olsen, so var Gert sjálvur ivaleysur í, at óstbeinið var brotið. Og miðvallarin veit, hvat hann tosar um. Tvær ferðir áður hevur hann hildið leingi frí frá fótbólti, tí óstbeinið hevur verið brotið.

Tað plagar at verða sagt, at tað tekur seks vikur, áðrenn tað ber til at fara undir aftur venjingarnar, tá óstbeinið er brotið. Um seks vikur verður sekstanda umfarið á skránni. Tað vil siga, at tíðin verður runnin frá Gert Langgaard, sum neyvan verður komin fyri seg aftur, tá síðsta umfarið verður spælt 5. oktober.

Gert var á vøllinum til dysturin ímóti GÍ var liðugur, men hann gjørdi lítla nyttu síðstu løtuna. Allar tríggjar skiftingarnar vóru gjørdar, tá Gert varð skaddur. Fysioterapeuturin hjá NSÍ, Marjun Thomassen, bant armin upp, og so roydni Gert sum frægast at vera í álopinum. Støðan var ikki so lítið átøk henni í dystinum ímillum Týskaland og Ongland í HM endaspælinum í 1970 í Meksiko. Ta ferðina var tað, at Franz Bäckenbaur síðstu løtuna spældi við hondini í fatli.

## Balling verður í NSÍ

Á síðuni við góðum tíðindum hjá NSÍ hevur tað alstóran týdning, at felagið sunnudagin skrivaði sáttmála við Ulrik Balling. Avtalan ber við sær, at fyrrverandi Vejle spælarin verður í NSÍ tað, sum er eftir av hesum kappingarárinum.

Ulrik Balling vísti í steypafinaluni ólavsøkudag, tá hann skoraði annað NSÍ málið, at hann er bæði raskur og málsøkin, og aftur sunnudagin var hann á rætta staðnum og skoraði annað NSÍ málið í 2–0 sigrinum á GÍ.

Undan vikuskiftinum varð ikki eitt orð grett um, at Ulrik Balling, sum morgunin eftir ólavsøkudag fór av aftur landinum, skuldi spæla við NSÍ í Gøtu.

*Duldu tit hetta fyri okkum?*

– Tað var ikki fyrrenn fríggjakvøldið, at eg fekk eitt vink um, at tað kanska fór at verða til tað, at Ulrik kom aftur henda vegin. Eg havi skilt tað soleiðis, at hann í síðstu viku vandi við onkrum donskum feløgum, og at hann ivaðist eitt sindur. Fyri okkum kom tað sera væl við, at hann gjørdi av at taka av tilboðnum, sum NSÍ gav honum, sigur Jógvan Martin Olsen, venjari hjá NSÍ.

Á NSÍ beinkinum vóru frá fyrsta bríksli Óli Hansen, Gert Langgaard og Ian Højgaard. Harumframt skal havast í huga, at Pól Thorsteinsson var leikbannaður. Tí kann ikki sigast annað, enn at NSÍ er væl fyri við fólki. Men sambært venjaranum fer tað at minka eitt sindur burturav nú:

– Kári Hansen verður leikbannaður næsta sunnudag. Bergur Djurhuus, sum hesa ferð var millum teir fyrstu ellivu, hevur fingið góðan kjans og fer til skips í nakrar vikur, og Ken Nónklett, sum hevur verið í 1. liðs hópinum, fer seinni í mánaðinum niður at lesa, sigur Jógvan Martin Olsen.



# Vón fyri framman hjá vágbingum

**Vágbingar fingu trý kærkomin stig, tá teir fríggjakvøldið vunnu uppibornan 3-2 sigur móti HB í 2 deild.**

2.DEILD MENN
*Páll Holm Johannesen*

Bæði liðini vóru skerd, tá tey brustu saman í dysti í 2. deild fríggjakvøldið. Ringast stóð til hjá HB, sum orsakað av skaðum og leikbanni, mátti hála fleiri spælarar upp í 1. deildarhópin. Vanligu framherjarnir á øðrum liði hjá HB, Eyðun Samuelsen og Gunnar Mohr, vóru ikki við, og hevði tað við sær, at broddurin í HB-álopinum ikki varð tann sami

Tað sást tó ikki í byrjanini av dystinum at at tað vóru HB, ið vóru skerdir, tí tað var heimaliðið, sum legði betri fyri.

Longu eftir trimum minuttum komu havnarmenn á odda, tá Danny Rasmussen fekk bóltin í mál eftir innlegg úr høgru síðu.

Men vágbingar fullu ikki í fátt, og stigvíst arbeiddu teir seg inn í dystin.

Tá 20 minuttir vóru spældir fingu teir løn fyri stríðið, tá Birgir Jørgensen kom at standa leysur, og fekk sett høvdið á, so bólturin fór í mál.

Tað sum eftir var av fyrra hálvleiki gekk spælið javnt á, men tað var VB sum átti teir flestu og bestu møguleikarnar.

Fleiri mál komu tó ikki í fyrra hálvleiki, sum sostatt endaði 1-1.

## Birgir og Danny aftur á blettinum

Seinni hálvleikur var ikki meir enn 5 minuttur gamal, so var HB aftur á odda. Aftur hesuferð var tað Danny Rasmussen, sum kom at standa fríur eftir hornaspark og kundi seta høvdið á.

Men sum í fyrra hálvleiki, komu vágbingar fyri seg, og longu 10 minuttir seinni, var Birgir Jørgensen aftur á blettinum við sínum næsta máli. Málið kom eftir eitt væl gjøgnumspælt álop, har besti VB-leikarin henda dagin, Mortan úr Hørg, stóð aftanfyri málgevandi avleveringina.

VB var vandamiklara liðið, og tí var tað onki forgjørt í, at Niclas Ludvig eitt korter fyri tíð setti eitt fríspark beinleiðis í mál til 3-2 til VB.

VB fekk sostatt trý týdningarmikil stig og hevur nú fingið samband við hini botnliðini. Sigurin var uppiborin, og kundi væl verið størri. Fyri HB hevði ósigurin við sær, at liðið nú er í niðurflytingarvanda, og er bert tvey stig frá niðasta plássinum.

**Dysturin í tølum:**
HB-VB 2-3(1-1)
1-0: Danny Rasmussen
1-1: Birgir Jørgensen
2-1: Danny Rasmussen
2-2: Birgir Jørgensen
2-3: Niclas Ludvig

HeimaBankin

Kenn teg heima

*- eisini sum útiseti*

Støkk inn á gólvið eftir einum ókeypis HeimaBanka. Við HeimaBankanum kanst tú sum útiseti framhaldandi røkja øll vanlig peningaviðurskifti ígjøgnum Føroya Banka. Útbúgvingarstuðulin SU kann flytast beinleiðis inn á tína vanligu konto, og eisini er møguleiki fyri at kanna saldo, gera flytingar og gjalda mest vanligu donsku og føroysku inngjaldingarkortini.

Vit vita, at sum lesandi kann tað vera trupult at fáa endarnar at røkka saman, og tí vilja vit í Føroya Banka virka fyri, at tíni fíggjarviðurskifti tyngja sum minst um lestrartíðina.

Um brúk er fyri vegleiðing um peningaviðurskifti, er tín ráðgevi í Føroya Banka altíð til reiðar at lurta eftir tínum tørvi.



Helgi Winter Olsen er lesandi og elitufimleikari í Danmark. Høvuðsstuðul hjá Helga er Føroya Banki.

FØROYA BANKI